# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Skilja mentan frá útbúgving?

Oddfríður Marni Rasmussen, formaður fyri Listafólkasamband Føroya hevur fyri stuttum í greinini Valstríðið, samgongan og framtíðin funnist at samgonguni fyri brot á givnin vallyfti. Í nevndu grein vísti Oddfríður á, hvussu hugaligt tað var, at stór semja var undir valstríðnum um, at alt mentanar- og listaøkið skuldi raðfestast og fáa hægri játtanir. Hann kom í nevndu grein til somu niðurstøðu sum vit her í hesum teigi um sama mundið, tá vit loyvdu okkum at staðfesta, at einki samanhang var millum givin lyfti og játtanir á fíggjarlógaruppskotinum fyri verandi fíggjarár.

Í blaðnum í dag tekur Oddfríður Marni Rasmussen hetta mál uppaftur í sera áhugaverdari grein, har hann nú viðger hetta mál frá einum heilt øðrum sjónarhorni. Hann vísir til grein her í blaðnum hjá mentamáláraðharranum, "Søguliga stór framstig innan útbúgving í 2008," har hon nevnir allar teir mongu glottar, sum nú hómast, men sum Oddfríður sigur allar at vera í skúlaverkinum. Mentanin er bert í yvirskriftini. Tað, sum formaðurin fyri LISA ger vart við, er, at mentanarpolitikkurin er púra klárur at seta í verk, tað er bert at játta tann pening, sum skal til. Hann ger vart við, at ikki er neyðugt við fleiri kanningum og álitum, tí vit hava øll tilmælini í eitt nú Mentan og menning og í Visjón 2015.

Eftir at hava sett fram nógv áhugaverd sjónarmið, kemur Oddfríður til ta sera áhugaverdu niðurstøðu, at mentanin eigur at verða skild frá útbúgvingar- og skúlaverkinum. Onkur hevur rikið upp undir hetta hugskot fyrr, men eingin hevur sagt hetta so greitt og sannførandi sum Oddfríður her í blaðnum í dag. Tað, sum hann á sera diplomatiskan hátt veruliga sigur, er, at so leingi mentan og útbúgving eru undir sama stjórnarráð, so verða mentan og serstakliga listin við sviðið soð. Listin verður stjúkbarnið, sum altíð má bíða, til hini hava fingið sítt og tá er oftast uppi, ja, hvør veit: kanska verður onkuntíð beinleiðis tikið frá stjúkbarninum og givið yndisbarninum. Okkurt kundi bent á, at hetta meira enn so er komið fyri seinastu tíggju árini. Uppskotið um at skilja mentan og útbúgving sundur í tvey stjórnarráð er so mikið áhugavert, at løgmaður átti at umhugsa hetta í størsta álvara. Okkurt má gerast, tí henda ósømiliga viðferð, sum mentan og list eru fyri, kann ikki halda fram.

**Sosialurin**

## Lýsingar í TEXT-TV og á pappíri

HERI MOHR



Um vit sláa inn á tað føroyska TEXT-TV, kann tað órógva viðkvæma sálarrøkt, sum ongin kann vera fyriuttan, og í ringasta føri kann hetta skunda undir sálarliga viknan (dement) hjá eldri fólkum, og tað, sum kanska verri er, líkasælu hjá yngri fólkum.

Vit kunnu tríva í rúgvuna.
**Á P400 lesa vit:**
V E R I
Ve ri S401
Ve urm tingar Landsverk S403
Aldum tingar Landsverk S404

Og sláa vit á 110 P120, lesa vit, at »forkvinnan i Målnevndini, Turid Sigurdardottir, sigur, at tad er ikki meira enn folkaligur atburdur, at venda sär til vidskiftafolkina å okkara egna måli. Lögtingið hevur endaliga samtykt, at *»Lysingar og lysingatilfar, sum er beinleidis atlad brukarum i Föroyum, skal vera å föroyskum«*.

Flest alt skrivligt lýsingartilfar, sum kemur til Føroya, er á fremmandum máli, á málum, sum vit í stóran mun duga at lesa og tosa. At vit føroyingar eru so væl fyri, at vit eru før fyri at málbera okkum á fleiri málum, er ein fyrimunur og styrki, sum vit ikki eiga at virðismeta nóg høgt.

Eitt við lóg bannað lýsingartilfar (brochurur o.tl.) frá eitt nú apotekinum og bilhandlarum kann fáa álvarsligar avleiðingar. Ella skal lóg um »ófólkaligan atburð« mótvegis viðskiftafólki við lýsingartilfari á fremmandum máli umsitast individuelt?

Avbyrging av neyðugum lýsingartilfari kann eisini fáa óhepnar málsligar og upplýsandi avleiðingar!

Ávísir handlar í Føroyum standa fyri sending av príslistum og/ella katalogum til hvørt hús eins og t.d. DaelsVarehus o.a. plagdu at gera. Um politiskur meiriluti er fyri at steðga slíkum »ágangi«, kundi landsstýrið hóskandi gjørt tað við einari kunngerð, tí hvussu skal brot móti løgtingslóg um lýsingar og lýsingartilfar verða revsað. Við sekt? fongsul? ella almenna, andaliga og fíggjarliga revsing (keypið ikki har)?

Rákið (tendensurin) í umrøddu løggeving má haldast at vera ódámligt, havandi í huga, hvat slíkt kann innibera.

……..

Hvat er størri ágangur móti okkara mentan: Føroyskt TEXT TV, sum er ólesiligt, ella lýsingartilfar á fremmandum málum, sum í stóran mun endar (ólisið) í ílatinum til endurnýtslu?

## Eg undrist!!!

KRISTBJØRG TOFTEGAARD

**Góðar loysnir fyri ein part av skúlabørnunum í Runavíkar kommunu - og lappa loysnir til børnini undir skúlaaldur í restini av kommununi**

Eg undrist ofta á tær avgerðir, ið verða samtyktar í býráðnum í Runavíkar kommunu.

Alt gott um at man loksins hevur tikið stig til at betra um hølisviðurskiftini á skúlaøkinum á eystara armi í kommununi: Men eg undrist, at tá man fer í holt við eitt prosjekt upp á 100 milliónir, at man tá ikki hugsar um, at hetta skal koma øllum skúlabørnum í kommununi at gagni.

Eg undrist á, at kommunan hevur tikið avgerð um at byggja tveir hálvar barnagarðar, ið hvørki nøktar tørvin á Skála ella í Søldarfirði.

Eg undrist á, at avgerð er tikin um at byggja tveir barnagarðar, ið ikki eru innrættaðir samsvarandi einum nútíðar pedagogiskum hugsunarhátti.

Eg undrist tá borgmeistari okkara heldur, at 50 ansingarpláss á Skála er nøktandi, tá yvir 70 børn eru í skipanini í dag - umframt at tað eru børn, ið standa á bíðilista.

Eg veit, at bæði eg og onnur hampa fólk av Skála av at umsitingin í kommununi og partar av Runavíkar býráð eru skírd grenj at verða. Men eg gleðist hvønn dag um at búgva á Skála, eg brýggi meg um tað umhvørvið eg livið í – Og Ja: Eg undrist, hvat mínar skattakrónur verða nýttar til, tí eg haldi meg ikki kunna síggja tær aftur her í bygdini.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.